Nr. 51/2019

Beinta Løwe
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um nýggjan húsarhaldsskúla, settur landsstýrismanninum í undirvísingarmálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu langt er komið við ætlanunum at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík?
2. Nær verður húsarhaldsskúlin liðugur?
3. Hvussu nógvum næmingum hevur nýggi skúlin pláss fyri?
4. Hvat væntast næmingagjaldið at verða?
5. Hvat hevur prosjektið kostað higartil?

Viðmerkingar:
Undanfarna samgonga játtaði 21 milliónir kr. í stuðli til byggingina. Eisini varð sagt í svari til fyrispurning frá undanfarna løgmanni, at spakin væntandi fór at verða settur í byggingina í juni 2019, og at skúlin fór at verða klárur at taka í nýtslu í 2021.
Lítið og onki hevur tó verið at hoyrt um byggingina í seinastuni. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 7. februar 2020

Beinta Løwe